## Tutl Live í 25 ár




*Tutl gevur nú nýggja fløgu út. Hetta er ein live fløga, sum er tikin upp á konsertunum, ið vóru hildnar í sambandi við 25 ára dagin hjá Tutl*

**Plátufelagið Tutl hevur nú givið út nýggja fløgu við heitinum Tutl 25 Live 2002**

ÚTGÁVA
*Ingrid Bjarnastein*

Henda útgávan er fjórða fløgan í røðini »Rockur í Føroyum«, tó við einum øðrvísi heiti: TUTL 25 LIVE 2002. Men júst henda fløgan er øðrvísi, tí talan er bert um konsertupptøkur, sum fóru fram í sambandi við tiltakið »Tutl 25 ár« í januar og september 2002.

Bólkarnir, ið við eru á fløguni, eru Clickhaze, Týr, 200, Krit, Flux, Gestir, MC-Hár, Hatespeech, Mold, Pete & Brian og íslendski bólkurin Úlpa.

Bestu upptøkurnar eru valdar út, og ljóðblandaðar til útgávuna.

Jan Zachariassen hevur staðið fyri ljóðblandinum, meðan Finnur Hansen hevur masterað. Húsan hava Niels Arge Galan og Uni Árting gjørt. Sólarn Solmunde og Kristian Blak hava samskipað útgávuna.

Upptøkurnar eru allar farnar fram í samstarvi við Útvarp Føroya.

## Jól heima á Garði í Hoyvík

**Aftur í ár skipar Fornminnissavnið fyri jólatiltaki í útisavninum í Hoyvík. Tiltøkini verða leygardagin og sunnudagin**

TÍÐINDASKRIV
*Solby A. Eliasen*

Mangt ymiskt verður á skránni á jólatiltakinum hjá Fornminnissavninum. Gamli Hoyvíksgarður verður jólaskrýddur og í úthúsunum fara kertuljós at hanga og lýsa upp í vetrarmyrkrinum.

Frá Fornminnissavninum verður sagt, at jólastákan og hugni eru lyklaorð í tí søguliga umhvørvinum, nú tað stundar til jóla.

Bakað verður á torvveldi, so tað rýkur um allar geilar. Og eisini verða fólk boðin inn um at síggja, hvussu hugnaligt tað kann verða har.

Uttanfyri verður eisini virksemi, har Kiwanis fer at selja jólatrø og børnini fáa ein møguleika til at sita á hestbaki. Teymaríðing við føroyskum rossum verður báðar dagarnar.

Og í smiðjuni stendur eisini smiðurin sjálvur í glæmuni frá essuni og smíðar eitt hvørt smátt.

Eisini verður høvi hjá fólki, sum vitja, at keypa heimavirkaðar lutir, sum verða seldir í Turkihúsinum.

Tað kann vera sera kalt hesa tíðina á árinum, og tá kann tað vera sera gott at fáa ein kaffimunn til keyps inni í Turkihúsinum við heimabakaðum jólakøkum afturvið. Sjálvandi ber eisini til at fáa te og saft.

Hesar báðar dagarnar verður eisini skipað fyri smáum "granskingarferðum", har børn saman við foreldrunum kunnu kanna, hvat fjalir seg í úthúsunum.

Fornminnissavnið hevur gjørt av, at tiltakið í ár verður ókeypis. Har verður sagt, at hetta skal verða eitt høvi hjá fólki at smoyggja sær burtur úr jólastressinum og fáa eina hugnaliga og friðarliga løtu í náttúruvakra umhvørvinum niðri í Hoyvík.

# Nalvin er í Hósvík



*Í dag, hósdag, letur upp nýggjur handil við heitinum Nalvin upp í Hósvík. Nalvin selur bøkur og málningar*

**Í dag letur nýggjur handil upp í Hósvík. Talan er um ein handil, sum selur bøkur og list**

HANDIL
*Ingrid Bjarnastein*

Nalvin er navnið á nýggja handlinum, sum í dag letur upp í Hósvík. Hetta er ein handil, sum selur bøkur og málningar. Orsøkin til navnið er, at áður hevur ein kiosk við hesum heitinum hildið til í hølunum. Hon er í dag hildin uppat, men navnið hevur fest seg við.

At gera eitt framsýningarhøli, har listafólk, kunnu sýna sína list fram uttanfyri Havnina hevur leingi verið ætlanin, men av ymsum orsøkum er seinasta stigið ongantíð tikið. Men nú verður so latið upp.

Hølið liggur væl fyri – nær við landsvegin og sýnisglugga, sum vendir oman ímóti vegnum.

### Listaframsýning

Á fyrstu framsýningini í handlinum verða tað tveir listarmenn, sum sýna fram.

Suni F. Jacobsen, sum er ein royndur málari, og Uwe Brand, sum er týskari.

Suni F. Jacobsen hevur tikist við at mála í meira enn fimmti ár. Hann hevur verið við á nógvum framsýningum, eisini uttanlands. Suni er gøtumaður, borin í heim í 1950. Fyrstu ferð hann sýndi fram var í 1951, og hann var við á ólavsøkuframsýningini út í sekstiárini og nakrar ferðir seinni.

Listarmaðurin úr Gøtu arbeiðir við olju, pastell, akvarell, penni, blýanti og koli. Annars hevur hann fingist við aðrar listagreinir, sum til dømis yrking og eitt sindur av tónasmíði, skriving og týðing.

Uwe Brand er úr Týsklandi, men hann hevur fleiri ferðir verið og vitjað í Føroyum. Hann er gávuríkur listarmaður, sum hevur ferðast víða, og frá hesum ferður eru nógvu málningar hansara. Teir, sum hanga í Nalvanum, eru tó við føroyskum evnum.

Umframt at mála undirvísir Uwe Brand eisini á einum miðnámsskúla. Hann byrjaði sum listamaður tíðliga í 80´unum, og hann royndi seg sum pallmálara, andlitsmálara og teknaði – myndprýddi – eisini nakrar bøkur.

Síðani 1990 hevur hann havt 15 ymsar framsýningar í ymsum londum í Evropa.

Nalvin hevur opið yrkadagar frá klokkan 18, og leygar- og sunnudagar frá 15 – 18.

# Iridium
# - eitt nýtt  ættarlið innan samskifti

**Nú taka trý Norðurlond lógvatak um at bjóða sjóvinnum á okkara leiðum, nýggjar samskiftismøguleikar. Tele Greenland, Landsími og Føroya Tele mynda útnorðurpartin av Iridium, ið veitir fjarskifti um fylgisvein.**

*Tíðindaskriv*

Fyri fáum árum síðan var Iridium frammi í føroyskum fjølmiðlum, men bogin var spentur ov hart teimum. Tá megnaði felagið ikki einsamalt at fyrisita skipanina í øllum londum og arbeiðið datt niðurfyri. Síðan hava einstakar telefyritøkur kring allan heim tikið tráðin upp og tær hava skipað seg í samstarvseindir, ið bjóða Iridium samskifti. Samstarvið millum Grønland, Ísland og Føroyar er eitt slíkt samstarv.

Iridium er ein skipan við 66 lágtflúgvandi fylgisveinum, ið sveima kring jørðina. Fylgisveinarnir eru bundnir saman, soleiðis at hvør blettur í jørðini er innan fyri arbeiðsøkið hjá skipanini.

Tað, ið er einamest spennandi við Iridium er, at uttan mun til hvar ein er staddur í verðini, er óbrotið samband millum partarnar, ið samskifta. Eingin relé-støð, ella transformari á jørðini, er við í samskiftisketuni.

Tá ringt verður við einari Iridium telefon, fer signalið beinleiðis upp í ein fylgisvein og síðan beinleiðis niður í telefonina hjá móttakaranum. Hetta gevur tann fyrimun, at dekningur er alla staðni - eisini har, ið aðrar telefonskipanir ikki røkka.

Serliga her hjá okkum, á norðaru hálvu, er ofta truplult at fáa samband við skip og bátar, tí vanligu samskiftisrásirnar, hava ilt við at røkka. Tað er ein væl kendur trupulleiki, fyri tey, ið hava sítt virkið á fjarleiðum, at hóast sambandið var so sum so, varð rokningin púra ítøkilig.

Men er hetta ein svunnin tíð, tí samskifti um Iridium fer fram á einari príslegu, ið liggur væl niðanfyri tað, vit eru von við.

Iridium telefonir fáast bæði hondbornar og til at seta fastar á brúnni ella aðrastaðni. Til skipanina fæst eisini eitt forrit, ið kann avrokna samrøður um so er at fleiri brúka telefonina.

Avrokningarskipanin, ið nevnist Tel-Log, er grundað á Windows skipanina og er bæði einføld og løtt at fáast við.

Um ynskiligt er at vita meiri um skipanina eru tit vælkomin at seta tykkum í samband við Føroya Tele, Hendrik Olsen, tlf. 30 30 30



# Spreingja burturúr Tinganesi at fáa pláss fyri nýggja suðuroyarskipinum

**Rættiliga nógv av botninum framvið Tinganesi má sprongjast burtur fyri at gera tað nóg rúmsátt hjá nýggja Suðuroyarskipinum. Samstundis má okkurt gerast afturat framvið Tinganesi, so at skipið hevur okkurt at detta inn at**

SUÐUROYAR-SIGLINGIN
*Áki Bertholdsen*



*Har, sum ætlanin er at nýggja suðuroyarskipið skal liggja, er bæði ov grunt og ov troingt og tí verður neyðugt at sprongja rættiliga nógv burturúr botninum framvið Tinganesi. Borgarstjórin í Havn heldur ikki, at tað verður nakar trupulleiki, tí tað er undir sjónum og onki fer at síggjast til tað*

Tað verður ikki bara sum at siga tað at fáa pláss fyri tí nýggja suðuroyarskipinum við bryggju í Havn.

Ætlanin hevur verið, at nýggja suðuroyarskipið skal hava fast pláss í krókinum við Kongabrúnna, heilt inni í Havnini.

Eitt er, at Landsstýrið og Tórshavnar Býráð ikki enn hava fingið loyst trupulleikan um, hvør skal gjalda ferjuhavnina til nýggja suðuroyarskipið.

Eitt heilt annað er, at skal tað verða nóg rúmsátt hjá tí nyggja skipinum, verður tað neyðugt at spreingja heilt nógv burturúr Tinganesi undir sjóvarmálanum.

Umboð fyri Tórshavnar Býráð og Strandferðsluna vóru fyri stuttum í Danmark, har royndir vórðu gjørdar fyri at vita, hvussu umstøðurnar vera hjá teimum stóru skipunum í Tórshavnar Havn, eftir at ferjulegan til Nýggju Norrønu og nýggja Smyril er gjørd.

Royndirnar vístu, at tað er neyðugt at spreingja munandi burturúr botninum framvið Tinganesi fyri at tað skal vera nóg rúmsátt hjá nýggja suðuroyarskipinum at leggja at, sigur Magnus Magnussen, tekniskur stjóri á Strandferðsluni.

Hann sigur, at samstundis verður neyðugt at gera eitthvørt afturat so at nýggja skipið hevur okkurt at detta inn ímóti. Verða pullartir ikki gjørdir á Tinganesi, má okkurt gerast undir vatni, so at skipið hevur nakað at detta at.

– Verður tað gjørt, ber til at manøvrera við nýggju Suðuroyarskipinum í Tórshavnar Havn, hóast tað er meiri enn 40 metrar longri enn Smyril, sum nú er og eisini nakrar metrar longri enn Norrøna, sum nú er.

Magnus Magnussen sigur, at verður tað hinvegin ikki gjørt, er støðan ein heilt onnur, tí tað er ov grunt og ov trongt, sum er.

### 18 metrar um sekundið

Annars vístu royndirnar, at tað ber væl til at manøvrera við nýggja Suðuroyarskipinum á Eystaruvág, hóast vindurin kemur upp á 18 metrar um sekundið.

Royndir vórðu gjørdar við utsynningi og landsynningi, sum eru ringastu ættir í Havn.

Kanska er tað onkur, sum heldur, at 18 metrar um sekundið er ikki serliga nógv. Men hetta verður roknað út uppá ein serligan máta og 18 metrar um sekundið er eitt sindur meiri enn Smyril, sum nú er, tolir, tí hann fær ikki manøvrera, fer tað upp um 13-14 metrar um sekundið.

Annars varð upplýst, at tað eru í meðal 26 tímar um árið, at nýggja Suðuroyarskipið ikki kann manøvrera á Eystaru Vág- og tað er ikki sagt, at tær løturnar passa akkurát so, at Smyril skal av Havnini, ella kemur til Havnar, júst tá.

Ætlanin er nú at søkja friðingarmyndugleikarnar um loyvi at sprongja burturúr Tinganesi undir sjóvarmálanum.

Jan Christiansen, borgarstjóri, væntar ikki, at tað verður nakar trupulleiki, tí tað, sum skal gerast er undir sjóvarmálanum og fer ikki at skemma Tinganes sum er, tí tað fer ikki at síggjast.

# Prísirnir hjá Strandferðsluni mugu hækka 15%

*– Ferðaseðlaprísirnir hjá Strandferðsluni eru ikki hækkaðir í 10 árog gongdin, sum nú er, kann ikki halda fram, sigur Reidar Nónfjall, stjóri á Strandferðsluni*



**Skal játtanin til Strandferðsluna ikki hækka næsta ár, verður neyðugt at hækka ferðaseðlakostnaðin , ella at lækka tænastustøðið**

STRANDFERÐSLA
*Áki Bertholdsen*

Næsta ár verður tað helst eitt sindur dýrari at sigla við skipunum hjá Strandferðsluni og at koyra við bussunum hjá Strandferðsluni.

Reidar Nónfjall, stjóri á Strandferðsluni, sigur, at skal játtanin til Strandferðsluna ikki hækka næsta ár, verður tað neyðugt at hækka prísirnar á ferðaseðlunum.

– Vit ætla ikki, at tað skal vera neyðugt at hækka játtanina. Men vil Løgtingið sleppa undan tí, verður tað neyðugt at útvega Strandferðsluni størri inntøkur ella at lækka túratalið.

Tí hevur Strandferðslan skotið upp at hækka ferðaseðlaprísirnir soleiðis, at stovnurin fær einar seks milliónir afturat í inntøkum.

Tað svarar til, at prísirnir á ferðaseðlum koma at hækka eini 15% í miðal.

Hann sigur, at enn er ov tíðliga at siga nakað um, hvussu hækkingin skal býtast ímillum tey ymsu sløgini av ferðaseðlum, men talan verður bæði um at hækka prísirnar við Bygdaleiðum og við Oyggjaleiðum.

Stjórin á Strandferðsluni sigur, at prísirnir á Strandferðsluni eru ikki hækkaðir í 10 ár, samstundis sum allar útreiðslur eru munandi hækkaðar. Eitt nú er oljan nú so dýr, at tað kostar Strandferðsluni einar níggju milliónir meiri um árið nú, enn tað gjørdi fyri nøkrum árum síðani, umframt at lønirnar eru nógv hækkaðar.

– Samstundis er tænastustøðið hjá Strandferðsluni nógv hækkað við fleiri túrum og gongdin við hækkandi útreiðslum og hækkandi tænastustøði kann ikki halda fram uttan at Strandferðslan eisini fær fleiri inntøkur.

– Og tað eru bara tveir møguleikar: Antin má játtanin alsamt hækkast, ella mugu prísirnir á ferðaseðlum dagførast.

– Hvørgin kosturin er mjúkur, men rokningin skal gjaldast, antin so ella so, antin rindar landið rokningina við skattakrónum, ella rinda tey, sum brúka Strandferðsluna.

– Higartil hava politikarar ikki vilja hoyra talan um, at túratalið skal lækka ella at prísirnir skulu upp, men nú halda vit, at vit eru komin hartil, at ein støða má takast.

Í løtuni er fíggjarlógin til politiska viðgerð, so Reidar Nónfjall veit ikki enn, hvør endin verður.

Í ár er játtanin til Strandferðsluna 75,1 millión. Upprunaliga var játtanin 70,7 milliónir, men harumframt hevur Strandferðslan fingið 4,4 milliónir í eykajáttan.

### Dámar ikki suðuroyingum

Tað dámar ikki suðuroyingum, at ferðaseðlaprísirnir hækka. Á Fundi í Porkeri herfyri, hava allir sjey borgarstjórarnir í oynni skrivað undir eina áheitan á Strandferðsluna um ikki at hækka prísirnar á Smyrli, tí teir meta, at hann er nóg høgur sum er.

Teir vísa á, at hetta er einasta farleið, suðuroyingar hava og at tað helst ikki skuldi verðið so, atr fólk setast aftur av tí at prísirnir eru ov høgir. Teir skuldu heldur lækkað, siga borgarstjórarnir í Suðuroy í brævinum, teir eisini hava sent fíggjarnevndini hjá Løgtinginum.